UTTAN ÚR HEIMI

## Sheehan fekk umbering

Amerikanska kvinnan Cindy Sheehan gjørdist kend, tá hon seinasta heyst setti seg uttan fyri húsini hjá George W. Bush, forseta í Texas at mótmæla krígnum í Irak, sum hevur kostað soni hennara lívið.

Fyrradagin gjørdi hon aftur vart við seg. Tað eydnaðist henni at sleppa inn í kongressbygningin, har forsetin skuldi halda røðu um støðu tjóðarinnar, men nakrir løgreglumenn koyrdu hana út, áðrenn forsetin kom. Orsøkin var, at Cindy var í einari troyggju við tekstinum: "2242 deyðir. Hvussu nógvir afturat?" Talið á troyggjuni sipaði til talið á hermonnum, sum USA hevur mist í Irak.

Nú hevur Cindy Sheehan fingið eina umbering frá løgregluni. Í brævinum stendur, at tað var ein misskiljing, at hon varð koyrd út, tí tað er upp til hvønn einstakan, hvussu hann ella hon letur seg í. Talskvinnan hjá kongressini, Kerri Hanley, heldur kortini, at Cindy Sheehan var ikki hóskandi ílætin til tað serliga høvið, sum var hendan dagin.

## Danir arbeiða yvirtíð uttan løn

Ein kanning hjá danska arbeiðsumhvørvisstovninum vísir, at nógvir danir arbeiða meiri enn ta ásettu tíðina, uttan at teir fáa eitt oyra afturfyri.

Høvuðsorsøkin er, at nógvir danir arbeiða eftir sáttmálum, sum bera í sær, at teir hava ikki fasta arbeiðstíð, men at arbeiðstíðin í veruleikanum umfatar allar tímar og allar dagar, skrivar Politiken. Tað ger, at fólk fáa ikki løn fyri at arbeiða ávísa tíð, men fyri at gera tað arbeiðið, sum tey skulu.

Í nógvum førum er úrslitið, at fólk arbeiða ov nógv. Arbeiðsumhvørvisstovnurin sigur, at sambært kanningini arbeiðir hvør dani í meðal fýra tímar yvirtíð um vikuna. Kanningin avdúkar eisini, at tann nógva yvirtíðin órógvar gerandisdagin, tí ov lítil tíð er til familjuna.

## Kongur lovar demokrati

Fyri einum ári síðani koyrdi kongurin í Nepal stjórnina til hús. Síðani hevur hann stýrt landinum einsamallur, men í gjár lovaði hann, at fólk skulu sleppa at velja nýtt ting innan apríl næsta ár. Nepal hevur ikki havt tjóðarting í næstan fýra ár, tí tað fekk eisini sekkin frá kongi.

Grundgevingin fyri at koyra stjórnina til hús í fjør var, at sambært kongi megnaðu politikararnir ikki at fáa enda á uppreistrinum hjá teimum vápnaðu maoistunum. Síðáni hevur hann sjálvur roynt seg, men hann hevur ikki verið stórt hepnari enn politikararnir, skrivar AP. Týsdagin fullu 16 løgreglumenn í samanbresti við maoistarnar, sum hava sýtt fyri at leggja vápnini.

Gyanendra kongur hevur skrivað út kommunuval í næstu viku, men andstøðan vil ikki luttaka. Maoistarnir hava hótt við at gera seg inn á tey, sum stilla upp, og tí er ikki eitt einasta valevni í nógvum kommunum. Ein orsøk til tað er eisini, at fleiri hundrað politikarar sita í fongsli eftir boðum frá kongi.

## Jarðfrøðingur snýtti

Løgreglan í japanska býnum Kyodo hevur tikið ein jarðfrøðing, sum er skuldsettur fyri at hava snýtt lærda háskúlan í Bergen fyri umleið eina millión krónur.

Hideki Shimamura, sum er ein av teimum fremstu jarðfrøðingunum í Japan, kom til Bergen síðst í nítiárunum við fimm tólum, ið verða brúkt til at máta ristingar í undirgrundini. Tólini kostaðu umleið eina millión krónur, og jarðfrøðingurin bað lærda háskúlan flyta peningin á eina kontu í einum japonskum banka. Nú vísir tað seg, at kontan var hansara egna, og at stovnurin, sum Shimamura arbeiddi hjá, visti einki um handilin.

Tann 64 ára gamli Shimamura, sum hevur arbeitt á jarðfrøðideildini á lærda háskúlanum í Hokkaido, noktar seg sekan, skrivar AP úr Tokyo.

# – Bush gloymdi okkum



*Soleiðis sær framvegis út í New Orleans - fimm mánaðir eftir ódnina »Katrinu«*

*Mynd: Reuters*

**Fólk í New Orleans og aðrastaðni fram við amerikonsku suðurstrondini eru vónsvikin av, at forsetin gloymdi tey, tá hann helt røðu fyri tjóðini**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey, sum mistu arbeiði, hús og heim, tá ódnin "Katrina" herjaði amerikonsku suðurstrondina, vóru sera vónsvikin, tá tey høvdu sitið og lurtað eftir árligu røðuni hjá George W. Bush, forseta fyrrakvøldið. Forsetin tosaði um orku, Irak og Miðeystur, njósning og yvirgang, men tey illa støddu í New Otleans og aðrastaðni fram við suðurstrondini sluppu ikki upp í part.

– Nú eru fimm mánaðir síðani ódnina, men hyggur tú teg um her, fært tú varhugan av, at tað eru fimm dagar síðani, sigur ein ill kvinna í New Otleans við Aftenposten. Ruddingararbeiðið hevur gingið sera seint, og langar húsaróðir eru óbygdar, tí eingin kann búgva í húsunum longur. Kortini vilja myndugleikarnir hava fólk at fara aftur til býin, men aftur til hvat, spyr tann illa kvinnan. Hon er ikki tann einasti New Orleans-búgvin, sum er vónsvikin.

– Ólíka var í september, tá forsetin var her. Tá helt hann røðu í Jackson Square, og har segði hann, at hann ætlaði sær ikki at helma í, fyrr enn New Orleans bleiv tann sami, sum hann var undan ódnini. Men tað lyftið hevur hann ikki hildið, og nú gloymdi hann okkum, sigur Ray Nagin, sum er borgarstjóri í býnum, við Aftenposten.

Ein kanningarnevn hjá kongressini skrivar í einari nýggjari frágreiðing, at verandi tilbúgvingarskipanir eru als ikki nøktandi, tá talan er um so stórar oyðileggingar sum av "Katrinu".

1300 fólk doyðu í ódnarveðrinum.

# Russar til reiðar at steðga veiðitjóvunum

**Men tað krevur, at Noreg ger sítt, sigur russiski sendiharrin í Oslo**

VEIÐITJÓVAR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umhvørvisverndarfelagsskapir og onnur halda, at á hvørjum ári verða umleið 100.000 tons av toski veidd ólógliga í Barentshavinum. Norðmenn hava fýlst á, at russar gera ov lítið fyri at steðga óskilinum, men russiski sendiharrin í Oslo sigur nú, at Russland er til reiðar at gera sítt.

– Vit hava líka stóran áhuga í at verja fiskastovnarnar í Barentshavinum sum norðmenn. Russland fær einki burtur úr tí ólógliga fiskiskapinum. Vit fáa ikki fiskin, vit fáa ikki skattainntøkur burtur úr hesum, og tí vilja vit fegnir steðga óskilinum, sigur Aleksandr Nikolajevitssj Panov við Aftenposten.

Sendiharrin sigur, at russisku myndugleikarnir eru til reiðar at búka væl fleiri pengar til at steðga tí ólógliga fiskiskapinum. Men hann leggur afturat, at tað verður ikki lætt, og at norðmenn mugu gera sítt, tí norskar fyritøkur medvirka til, at tann ólógligi fiskurin kann seljast.

Lesið Sosialin - so eru tit við